# TILTØK

**Gudstænastur**
**2. sunnudag e. Trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11, Sverri Steinhólm
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Bergur D. Joensen, altarg.
***Argja kirkja:*** kl. 11, Heri Joensen
***Kirkjubøur:*** kl. 12.15, Heri Joensen
***Miðvágur:*** kl. 11, David Johannesen. Ungdómskórið í Vágum syngur
***Kvívík:*** kl. 12, Inga Poulsen Dam
***Øravík:*** kl. 12, Jónsvein Bech
***Gøta:*** kl. 11 (altarg.,) Martin R. Jacobsen
Søldarfjørður: kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð,
***Oyndarfjørður:*** kl. 12, altarg., Jógvan Fríðriksson
***Hvalvík:*** kl. 12, Marjun Bæk
***Haldarsvík:*** kl. 11,
***Tjørnuvík:*** kl. 12, Mogens Tilsted Christensen
***Fuglafjørður:*** kl. 11, altarg., Uni Næs
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Niels Pauli Danielsen, útvarpað.
***Haraldssund:*** kl. 11, Hans Eiler Hammer
***Sandur:*** kl. 12, Jákup R. Hansen
***Skálavík:*** kl. 16, Jákup R. Hansen
***Leiti:*** kl. 11,
***Porkeri:*** kl. 12, Patrick de Neergaard
***Hvalba:*** kl. 12.30 Ólavur Rasmussen

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Sverra Steinhólm, presti. Evni: Virkið Heilaga andans.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting. Barnaansing verður eisini.
Mánakvøld kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Mánakvøldið kl. 21.30 Bíbliugransking.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Fabrizzio Milazzi, prestur í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúli kl. 14.
www.katolsk.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardag kl. 11 Útifundur.
Sunnudag kl. 11 Møti.
Sunnudagsskúli kl. 14. Bøn kl. 17.30. Møti kl. 18.
www.frelsunarherurin.fo

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Hendrik Olsen, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli í Býlingshúsinum á Norðasta Horni og møti í Missiónshúsinum kl. 18 v/ Sigurd Sørensen.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Leygardagin kl. 14 Samkomudagur í Ítróttarhøllini á Nabb.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Sámuel Jacobsen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC. Evnið: »At vitna í dagligdegnum« 2. partur v/ Ólavi Guttesen, kl. 22 Útimøti á Vaglinum. Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067.
www.filadelfia.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 á familjumøtinum talar Gunnar Nielsen um evnið: »Trúboðarin Paulus«. Kl. 11.30 Samvera við drekka. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Z. um evnið »Halgan í hjúnabandinum 1«. Barnaansing er undir møtinum. Sunnudagsskúlin kl. 12.
Týskvøldið kl. 20 samlast húsbólkarnir.
www.livdin.fo

**Frá Ebenezer**
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night.
Sunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.
www.ebenzer.fo

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, 20 ára hátíðarhald.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Leygardagin kl. 12 Brúðarvígsla.
Sunnudagin kl. 11 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Felags bønarmøti.
www.gospel.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samtundis barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og kl. 12 Møti, har Klæmint Eliasen úr Fuglafirði talar.
www.hebron.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti v/ Suna Justinussen.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta, kl. 14 Sunnudagsskúli/-junior, kl. 19 Møti við teimum ungu.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin verður morgunmøti við breyðbróting kl. 11, Palli Højgaard talar. Øll hjartaliga vælkomin.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og kl. 21 Ungdómsmøti.

**Filadelfia, Miðvágur**
Sunnudagin kl. 11 Familju- og Morgunmøti við sunnudagsskúla.
Mikukvøldið kl. 20 Undirvísing og bøn.

**Missiónshúsið í Miðvági**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 við luttøku úr missiónshúsinum í Skopun. Øll eru hjartaliga vælkomin. Sunnudagsskúlin er kl. 14.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ offurgongd kl. 18. Barnaansing og drekka.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Jan Jacobsen.
Sunnukvøldið kl. 17 Møti við Jastrid Høj. Sangur við Eyðun Jacobsen. Barnamøti kl. 17. (Aftaná verður náttúrði, øll taka við). www.keldan.fo

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 20 Ungdómshúsmøti.

**Eiði og Funningur**
Heimamissiónin hevur útimøti leygardagin kl. 19 á Eiði og kl. 21 í Funningi.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 19 Møti við Una Næs. Evnið: Kristiliga, lurtara- og hyggjara felag. Innsamling til ársgávu til Heimamissiónina. Aftaná møti verður drekka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 18 Familjumøti. Barnakórið syngur. Náttúrði aftaná. Innsavnan til Thabor.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við bíbliubólkinum hjá kvinnum og kl. 21 Ungdómsmøti við Marius Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Leygardagin kl. 21 Ungdómsmøti við Christian Joensen, Gospelkórið Gleði syngur, kl. 00.30 Tónleikacafé við livandi tónleiki.
Sunnudagin kl. 15 Barnasangscafé, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti, Streingjakórið syngur. Øll hjartaliga vælkomin til øll tiltøkini á Norðoyastevnu.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin ongin sunnudagsskúli og onki møti.

**Getsemane, Klaksvík**
Leygarkvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Ongin sunnudagsskúli er sunnudagin.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Møti við Hans Berntsen.
Týskvøldið kl. 19 Bíbliutími.
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti um kvøldið.

## Brúdleyp

Leygardagin 11. juni kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Teresa Magnusen úr Lamba og Magnus Djurhuus Joensen av Nesi. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 17.00 og opið hús kl. 20.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík.

Leygardagin 11. juni kl. 14.00 giftast í Evangeliihúsinum í Havn Anamaria Dan og Jákup Frederiksen.

Leygardagin 18. juni kl. 14.00 giftast í Sandavágs kirkju Sigrid Hammer, Hvalba og Jón Edvard Petersen, Sandavágur. Døgurði verður fyri innbodnum á Hotel Vágum og opið hús verður í heiminum, Sóljuteigur 2 í Sandavági, frá kl. 20.00.

Leygardagin 25. juni kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Margreth Olsen, Argir og Hildibrandur Olsen, Tórshavn. Veitslan verður í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 210756/210755 áðrenn 10. juni.

Leygardagin 25. juni kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Katrin á Mýrini og Kári Næss Ramussen, Tórshavn. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 317022/243532 ella 222369 innan 11. juni.

Leygardagin 2. juli kl. 15.00 giftast í Sjóvar kirkju Sunfríð Berg Jacobsen, Skála og Alexandur Johansen, Strendur. Veitslan verður hildin í ítróttarhøllini á Skála kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarligast biðin um at siga frá á tlf. 441615, 229696 ella 225782 ella skriva til alexand@post.olivant.fo áðrenn 15. juni.

Leygardagin 2. juli kl. 16.00 giftast í Porkeris kirkju Jensia Nolsøe úr Trongisvági og Kristian Olsen úr Porkeri. Veitslan verður hildin í Ítróttarhøllini í Trongisvági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 12. juni á tlf. 313736, 264981 ella 272864.

Leygardagin 2. juli giftast í Christianskirkjuni Dania Ragnarsson og Terji Poulsen, bæði úr Klaksvík. Døgurðin verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í Skálanum kl. 20.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 319125, 455950 ella 275180 áðrenn 18. juni.

Leygardagin 2. juli kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Anna Petersen og Christian Danielsen, Tórshavn, (ættað úr Húsavík). Veitslan verður í B36-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 312265, 594670 ella 250232 áðrenn 20. juni.

Leygardagin 9. juli kl. 15.00 giftast Jens Pauli Hansen og Joan Andreasen í Christianskirkjuni í Klaksvík. Veitslan verður á Hotel Norð á Viðareiði kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 222258, 215297 ella 224473 áðrenn 25. juni.

Leygardagin 23. juli giftast kl. 14.00 í Skála kirkju, Heidi Magnusdóttir Hansen, Hellur og Svenn Harry Johansen, Saltangará. Veitslan verður í Ítróttarhøllini á Skála kl. 18. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, vera biðin um at siga frá á tlf. 258407 ella 222567 innan 2. juli.

## Silvurbrúdleyp

14. juni kunnu hjúnini Anna Petra og Karlon Winther í Havn halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við buffet frá kl. 10.30 til 16.00 tann 19. juni í Róðrarneystinum á Argjum. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 213777, 310332, 361357 ella 361505 áðrenn tann 9. juni.

5. juli kunnu hjúnini Joan og Tage Jørgensen, Sørvágur, halda silvurbrúdleyp. Veitslan verður í Sørvágs Bio 9. juli kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið, verða biðin um at ringja tlf. 266018/332326 ella 333663 áðrenn 1. juli.

Til familju, vinir og kenningar! Leygardagin 9. juli kl. 19.00 hava vit eina hugnaløtu í Bygdarhúsinum í Leirvík í samband við silvurbrúdleyp okkara. Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum, verða biðin um at siga frá innan 1. juli á tlf. 457141 ella 0047-57720633.

# EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

## Sí Jesus

*»Dagin eftir sær hann Jesus koma til sín og sigur: »Sí, Guðs lambið, sum ber synd heimsins!... ««*

*(Jóh 1,29)*

Guds lambið er Jesus Kristus og innihaldið í gleðiboðskapinum.

Í Gamla Testamenti verður profeterað um tann komandi Messias á tvinnanda hættir. Eini hátturin er at umtala hann sum kong og harra, og hin sum tænara og offur.

Menniskjum líkt heftu jødarnir seg við hetta fyrra, at Jesus skuldi bara verða kongur og harri, tí hvat kann ein nýta ein tænara og eitt offur til? Henda hugsan var so rótfest í fólkinum, at sjálvt lærusveinarnir – teir, sum áttu at vita betri! – ikki sluppu hesi hugsan fyrr enn eftir Jesus deyða og uppreisn.

Eitt undantak var: Jóhannes doyparin! Boðskapur hansara var, at høvuðstrupulleikin hjá Ísraels fólki ikki var rómverjar fyrst og fremst, men fólksins egna synd!

Rómverjar høvdu ytra valdið á fólkinu, men syndin tað innara valdið. Rómverjar hevði við viðurskiftini her á jørðini at gera, men syndin eisini við ævigu støðu teirra.

Tað, sum fólkinum tørvaði, var ein frelsara, sum kundi reinsa fólkið frá syndum teirra, so at viðurskifti teirra við Gud, vórðu rættað upp aftur. Tað var syndin, boðaði hann, sum leggur í oyði lívið millum menniskju her, men ikki minst viðurskifti teirra við Gud.

Synd er alt tað illa sum kemur innanífrá av girnd, øvund, baktalan, klandri, beiskleika og hatri mótvegis næsta okkara og vantrúgv og stoltleika mótvegis Gudi.

Jóhannes var greiður um, at øll ofringin av ymiskum djórum og fuglum í Gamla Testamenti, og alt tað blóð, sum her fleyt, hevði eittans endamál: at boða offurlambið, sum koma skuldi at geva sítt lív og lata sítt blóð renna fyri allar heimsins syndir. Allar, ikki bara fyri syndir Ísraels fólks. »Sí, Guds lambið, sum ber synd heimsins!«, segði hann.

Sí, Guds lambið, sum kann fyrigeva okkum allar syndir okkara og reinsa okkum frá allari órættvísi.

Sí hetta lamb, trúgv á tað og set títt álit á tað. Amen!

**Bergur Debes Joensen**